# E - og tónleikurin



**Sólarn Solmunde**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Har var ein kassagittari, men eg lærdi ongantíð at spæla upp á hann.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Eg havi roynt meg við Jembe, men nei, eg dugi ikki at spæla uppá ljóðføri.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Onkuntíð, men ikki meira enn aðrastaðni.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja, mangan, men hevði eg nú verði tónleikari, hevði eg neyvan fingið gjørt líka nógv rundanum tónleikin.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Ótrúliga nógv, men tó hava konan, familja, vinir og Gud eisini nógv at siga fyri meg. Men innan yrki hevur tónleikur alt at siga fyri meg.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Ímillum 400 og 500.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Eingin ávís, tað hava verið nógvar gjøgnum tíðina, júst nú er tað kanska Blonde Redhead og Propellerheads, men kanska er tað onkur onnur um tvær vikur. Allar útgávurnar hjá Enekk standa mínum hjarta nær.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Nógvar, kanska John Mogensen og TV2.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Danmark er et dejligt land.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Red Hot Chili Peppers – Californication, skræpa!

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Leið meg einaferð enn út á dekkið.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Tað kann vera so ymiskt, alt eftir hvat slag av hugnaligum hýri, tað er.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Tað sama sum aðrar morgnar, bara tað er gott.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– 80% av tí, sum ÚF spælir, og alt sum Rás2 spælir.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Afrikanskur og Cubanskur tónleikur.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Minnist ikki akkurát hvønn sang, men eg minnist at mær dámdi væl Elvis, og mær dámdi væl Kim Wilde, tá hon kom fram...

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Eg havi bara verið við til at gjørt ein sang, og tað var "Hjörna í mál" — GÍ-sangurin, also rokkarin.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tað havi eg ikki avgjørt, men ein góður sangur hjá onkrum, ið eg kenni og sum stendur mær nær, kanska Trom hjá Clickhaze.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Eg havi verið til sera nógvar góðar konsertir: Youssou N´Dour, Muse, Deus, Úlpa, Enekk, Clickhaze o.fl.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Teir somu, sum eg hitti regluliga í nærumhvørvinum, men annars er tað altíð áhugavert at møta tónleikarum, tí tað er tónleikurin, sum er felags áhugamál.

**Vegna verkfall er blaðið nógv skert. Tí bíðar greinarøðin um Stalin.**

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Urd Johannesen, London, urdjohan@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Sorry gentlemen

Afturkomin til Føroya at halda páskirnar, legði eg skjótt til merkis, at tað var eitt orð, sum í heilum hevði hug at gleppa úr mær, hvørja ferð, eg kom ov nær ella stóð í vegin fyri onkrum. Sorry! Einar tvær ferðir miseydnaðist tað, ikki at siga sorry, og alt gekk so skjótt fyri seg, at ikki vóru stundir at umseta. Umskylda meg, men tað er eitt refleks, tillagað enskum stórbýarmentaliteti.

Eg havi ongantíð roynt at talt, hvussu ofta eg hoyri orðið sorry hvønn dag her í gøtunum í London, men eg vildi mett, at orðið verður sagt fleiri milliónir ferðir um dagin. Bretar eru sera høviskir og fólkaligir samstundis sum kroppslig nærkontakt ikki hóvar teimum so væl, misskil meg rætt; ein skal helst ikki standa ov nær og als ikki nerta við hvønn annan. Væl at merkja undantikið, tá ið ein koyrir í undirgrundstokunum, har fólk standa so trongt, at ein kann/er noyddur at lukta, hvat fyri anti-perspirant luktilsi síðumenninir brúka, ella áttu at brúkt! Í tokinum og t.d. inni á Oxford Street er so nógv trokarí, at tað er ómøguligt at ganga ónortin framvið. So onkusvegna hava fólk, fyri at halda fast í teirra høviska atburði, ment sorry-refleksið. Mær dámar væl, at fólk eru høvisk, men til tíðir haldi eg, at hesin sorry mentaliteturin er eitt sindur ov nógv at tí góða. Um ein viðhvørt kennir seg eitt sindur einsamalla í milliónbýnum og ikki kennir eina skjel hóast ein møtir í túsundtali av fólki, so ger tað ikki støðuna betur, at tað einasta orðið, ein hoyrir er 'sorry'. Sum um øll vóru kedd av, at ein var í vegin tann dagin. Av tí sama haldi eg, at sangurin hjá Elton John, har hann syngur "sorry seems to be the hardest word" er nakað tvætl. Eg fái tað ikki heilt at hanga saman. Fyri mær tykist sorry at vera 'the easiest word'. Sum um tað er alt í lagi at skumpa, troka og brúka albogar, bara ein sigur sorry ímeðan. Men hetta er jú sera snildisligt, tí ein kann ikki rættiliga tilláta sær at blíva illur inn á ein idiot, sum dugir at umskylda seg?

Nú leyp eg kanska framav og fór eitt sindur illa við teim bretsku gentlemonnum. Sorry! Rætt skal verða rætt. Tá ið eg vendi aftur til London eftir mína páskafríð í Føroyum, kom ein onnur síða av ensku høviskheitini fram, sum hevur uppiborið allan heiður og øvundsjúku. Eg kom knossandi við mínum sera tunga viðføri (kanska serføroyskt fyribrigdi?) upp ígjøgnum trappur, frá einum tokbana til annan, og ikki minni enn tríggir gentlemenn á trimum 'etappum' bjóðaðu sínar vøddar fram fyri at hjálpa mær. Eg var sera takksom, tí eg haldi ikki, at eg var komin livandi burturúr hesari ferð uttan teirra hjálp, og eg hevði uttan iva trokað og skumpað til nógv fólk, um eg skuldi borið alt viðførið sjálv. Í tokinum leyp ein maður inn við einum lítlum guittara og hátalara og byrjaði at spæla og syngja. Ein slík spontan gerð er als ikki nakað, ið ein sær hvønn dag her, og eg mátti smílast, tá ið eg sá, hvussu torført tey ferðandi høvdu við at finna røttu 'maskuna' til henda mannin, sum sprudlaði av orku og framførslugleði. Tey flestu fluttu seg við óbehag í setrunum og hugdu niður í gólvið. Sjálvandi kom hatturin so umsíður fram og gekk úr hond í hond. Klirrið av teim nógvu smápengunum bar boð um, at teir ensku gentlemenninir ikki betaltu fyri framførsluna men fyri at fáa mannin at halda munn. Tá ið maðurin eftir sína stuttu framførslu leyp út úr tokinum, segði hann "thank you and mind the gap". Kanska hann meinti tað bókstaviligt, men eg haldi eisini, at tað var eitt lítið prik til teir heldur stirvnu gentlemenninar, og kanska til mín eisini.